

## Byggimálsviðgeri [endurlýsing]

Søkt verður eftir einum starvsfólki til byggimálsviðgerð. Talan er um eitt fulltíðarstarv á byggi- og býarskipanardeildini.

**Høvuðsuppgávur**

- Byggimálsviðgerð
- Byggieftirlit
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanardeildina, og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum
- Samskifta við borgarar, feløg og stovnar

**Førleikakrøv**

Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari ella hava viðkomandi handverkaraútbúgving. Harumframt skipar kommunan fyri skeiðum í byggimálsviðgerð í Danmark.

Umsøkjarin skal duga væl at samskifta og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad ella MicroStation, men hetta er tó ikki nøkur treyt.

**Persónligir eginleikar**

Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja sær arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast til ber. Lønin verður í 4. lønarflokki, sambært sáttmála millum Føroya Starvsmannafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

um starvið við at venda sær Magna Dalsgaard, leiðara ella Mikael Viderø, býararkitekt, tlf. 302010.

**Umsókn**

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar komunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 22. desember 2006. Viðmerkið umsóknina „Starv á byggi- og býarskipanardeildini".

Byggi- og býarskipanardeildin er partur av teknisku fyrisitingini. Á deildini starvast 4 burturav við málsviðgerð av umsóknum um byggiloyvi v.m.

Árliga verða umleið 150 ymisk byggiloyvi givin.

Vit bjóða búningsmøguleikar og góð arbeiðsviðurskifti.

Byggi- og býarskipanardeildin er í sama bygningi sum Snarskivan.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

FISKIMÁLARÁÐIÐ
Fiskiveiðieftirlitið

## Ófulltikin dekkari til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum ófulltikin dekkari á skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst.

Ert tú ung/ungur, og hevur hug til arbeiði umborð á skipi, er hetta ein góður møguleiki. Starvstíðin sum ófulltikin dekkari, telur á sama hátt sum starvstíð við handilsskipum

Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars taka lut í vanligum skipsarbeiði.

**Førleikakrøv:**

- Heilsuváttan fyri sjófólk. Uttan avmarkingar og skikkaður til kagtænastu.
- Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.

Setanin sum ófulltikin dekkari er avmarkað til tvey ár.

Starvið sum ófulltikin dekkari verður sett sum skjótast.

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Skrivlig umsókn við: CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 21. desember 2006 kl. 1200.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Fiskimálaráðið
Att.: Fiskiveiðieftirlitið
Heykavegur 6
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um størvini, kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.

## Til sølu

Nýggir møblar: Dupultsong, 3- og 2 mans leðursofur, hornasofaborð og vanligt sofaborð (glas). Køksborð við 4 stólum. Veggreol við glasskápum við ljósi í. Til sølu fyri ½ prís.

**Tel 50 20 49, best eftir kl. 18.30**

**Vit átaka okkum alt mekaniskt arbeiði**

ØLL BILSLØG

**Søla av FULDA dekkum**




**BILVERKSTAÐIÐ · TLF. 50 79 77**
485 Skálafirði

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

**INVENTAR TÆNASTAN**

**Sølu- og avgreiðslufólk**

Starvsfólk søkist til fjølbroytt arbeiðið, ið umfatar sølu, kundarøkt, avgreiðslu og uppsetan.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava teldukunnleika á brúkarastøði, og somuleiðis verða handaligur.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagið tann 20.12.06.

Starvssetan skjótast til ber, men eru sinnað at bíða eftir rætta fólkinum.

Eru spurningar ert tú altíð vælkomin at ringja á tel 353800 og tosa við Jørgen Petersen.

**INVENTAR TÆNASTAN**

Heygsvegur 33
Postsmoga 1002
FO-110 Tórshavn

Tlf. +298 35 38 00
Fax + 298 35 38 01
inventar@inventar.fo
www.inventar.fo